Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Gjald fyri koronukanningar við markið

Spurningar:

1. Hví eru koronukanningar av ókoppsettum ferðandi við markið ókeypis ?
2. Hvussu nógv væntar løgmaður, at kostnaðurin hjá landskassanum fyri hesar koronukanningarnar fer at verða?
3. Er ætlanin at leggja uppskot fyri Løgtingið um, at øll ferðafólk, koppsett sum ókoppsett, skulu rinda fyri koronukanningar við markið á sama hátt, sum tað áður var galdandi?
4. Um ikki, hvør er orsøkin til hesa støðutakan ?

Viðmerkingar:
Koronukanningar eru aftur settar í gildi við landamarkið eftir boðum frá farsóttarnevndini. M.a. skulu fólk, sum ikki eru koppsett, ella ikki eru liðugt koppsett, kannast fyri koronu við markið, og tann kanningin er ókeypis.

Løgtingið hevur áður samtykt, at ferðafólk sjálvi skuldu rinda fyri koronukanningar við markið, men tann skipanin er ikki í gildi longur. Hetta spardi føroyska skattgjaldaranum nógvar milliónir.

Tí kann tað tykjast undranarvert, at kanningin av ókoppsettum ferðandi nú er ókeypis, at skattgjaldarin skal rinda fyri hetta, meðan tey koppsettu ferðandi sjálvi skulu rinda, um tey ynskja at verða kannað við komu til landið.

Á Løgtingi, 16. november 2021

Beinta Løwe